**Løgtingsmál nr. XX/2010: Uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt**

# Uppskot

# til

# løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** § 8 stk. 1 verður orðað soleiðis:
“ *Stk. 1.* Til tess at røkja tað dagliga arbeiðið, setir kommunan ein leiðara fyri dagstovnin og ein leiðara fyri dagrøktina, sum skulu hava námsfrøðiliga útbúgving. Leiðari fyri sjálvsognarstovn verður settur av nevndini fyri stovnin. Størvini verða lýst leys alment.

**2)** Í § 8 verður sett nýtt stk. aftaná stk. 1:
“*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann eftir nærri ásettum reglum, eftir umsókn frá kommunu loyva, at dagstovnur og dagrøkt hava felags leiðslu.” Stk. 2 verður hereftir stk. 3, stk. 3 verður hereftir stk. 4 og stk. 4 verður hereftir stk. 5.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Skotið verður upp at broyta dagstovnalógina við atliti at kunna hava felags leiðslu fyri dagstovn og dagrøkt.

Ein afturvendandi trupulleiki er tulkingin av § 8, stk.1 í dagstovnalógini, ið er soljóðandi:

“Til tess at røkja tað dagliga arbeiðið, setir kommunan ein leiðara fyri dagstovnin ella dagrøktarskipanina við námsfrøðiligari útbúgving.”

Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya hava víst á, at henda ásetingin øll árini, dagstovnalógin hevur virkað, hevur verið ein forðing fyri, at kommunurnar hava kunnað samskipað leiðsluna fyri fleiri dagstovnar, samskipað leiðsluna á einum dagstovni við fleiri deildum ella samskipað leiðsluna fyri dagstovnar og dagrøkt.

Mett verður, at ongin heimild er í dagstovnalógini fyri at gera undantak fyri at hava felags leiðslu á dagstovni og dagrøkt.

Uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt skal gera tað møguligt hjá kommunum, eftir umsókn, at hava felags leiðslu fyri dagstovn og dagrøkt. Landsstýrismaðurin skal gera nærri reglur um, hvørjar fortreytir skulu vera galdandi fyri at kunna skipa felags leiðslu fyri dagstovn og dagrøkt.

Sambært Barnarættindasáttmálanum er tað landsins uppgáva at hava barnsins besta í huga, tá tað almenna setur karmar fyri virksemi, sum hevur við viðurskifti hjá børnum at gera. Dagstovnar og dagrøktir eru fyrst av øllum skipanir, sum skulu geva børnum góðar menningar- og mentanarmøguleikar. Og tí skal barnsins besta altíð vera fremst í huga, tá samfelagið setur karmar fyri virksemi hjá børnum.

Dagstovnar og dagrøktir eru tvær ymiskar skipanir, sum eru eyðkendar av hvør sínum pedagogiska arbeiðshætti, karmi og møguleika.

Bæði dagstovnar og dagrøktir skulu leggja dent á dygdargott námsfrøðiligt arbeiði. Eyðkenni fyri arbeiði á **dagstovnum** er, at útbúnir námsfrøðingar skulu standa á odda fyri arbeiðinum og minst tveir triðingar av starvsfólkunum skulu hava námsfrøðiliga útbúgving. Pedagogiska leiðslan á dagstovnunum hevur ábyrgd av, hvussu pedagogiska uppgávan verður útint, og hvørjar pedagogiskar møguleikar børnini fáa. Leiðarin á dagsstovninum eigur at vera virkin luttakari í dagliga pedagogiska orðaskiftinum og vera trygdin fyri, at námsfrøðiliga arbeiðið er í støðugari menning.

**Í dagrøkt** er talan um skipaða ansing í heimi dagrøktarans, og tað er ikki eitt krav, at dagrøktarnir skulu hava námsfrøðiliga útbúgving, men at dagrøktarleiðarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving. Dagrøktarleiðarin skal vera ein trygd fyri pedagogiska arbeiðinum, og fyri at umstøðurnar í dagrøktarheiminum eru í lagi. Umframt tann umsitingarliga partin av dagrøktini, so er høvuðsuppgávan hjá dagrøktarleiðarum at vegleiða dagrøktarum í teirra pedagogiska arbeiði. Vegleiðingin skal byggja á samveru og eygleiðingar av børnunum og av samspælinum millum børn og dagrøktara. Neyðugt er, at dagrøktarleiðarin luttekur í arbeiðinum í spælistovunum saman við børnunum og dagrøktarunum fyri at hava grundarlag fyri vegleiðing og fyri at kunna vera fyrimynd fyri dagrøktarnar. Dagrøktarleiðarin hevur eisini ein týdningarmiklan leiklut sum eftirlitismyndugleiki í tí einstaka dagrøktarheiminum. Dagrøktin eyðkennist av, at tað júst ikki er ein stovnur, og eigur at byggja á tær dygdir, sum uppaling í heimahúsi hevur.

Umráðandi er, at lógarbroytingin ikki ávirkar tað ábyrgdarfulla arbeiði, sum dagrøktarleiðarar skulu røkja fyri at tryggja børnum, foreldrum og dagrøktarum eina dygdargóða dagrøkt.

Um dagrøktin er so lítil, at grundarlag ikki er fyri einum dagrøktarleiðara í fullum starvi, eru galdandi vegleiðandi reglur, at starvstíð dagrøktarleiðarans hevur verið niðursett, sum víst niðanfyri:

1. Er barnatalið 1-5 verður starvstíðin ¼ tíð
2. Er barnatalið 6-14 børn verður starvstíðin ½ tíð
3. Er barnatalið 15-29 verður starvstíðin ¾ tíð

Námsfrøðiligir vegleiðaratímar verða øktir í samsvari við økt barnatal.

Tað er ein vansi hjá teimum heilt smáu dagrøktunum, at trupult er at fáa eina nøktandi avloysaraskipan fyri børnini í samband við fráveru hjá dagrøktarum, t.d. vegna sjúku. Tað kundi verið ein fyrimunur fyri børn og foreldur, um børnini høvdu møguleika at koma á dagstovnin í kommununi teir dagarnar, tá tað ikki ber til at koma í dagrøktina. Somuleiðis kann tað vera ein fyrimunur við felags leiðslu fyri dagrøkt og dagstovn, tí sambandið hjá dagrøktarunum við dagstovnin kundi givið dagrøktarunum íblástur til námsfrøðiliga arbeiði við børnunum í dagrøktini. Avgerandi fortreyt fyri at skipa felags leiðslu fyri dagstovn og dagrøkt er, at neyðug arbeiðsorka verður sett av til at røkja vegleiðara- og eftirlitisuppgávuna hjá dagrøktini og somuleiðis at røkja tað fjølbroyttu leiðsluuppgávuna á dagstovninum.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan. Avvarðandi kommuna og foreldur rinda tær útreiðslur, sum eru av virkseminum. Foreldragjaldið skal í mesta lagi vera 30 % av rakstrarútreiðslunum. Allar húsaútreiðslur verða rindaðar av kommununi.

Landsstýrismaðurin skal gera nærri reglur fyri, hvørjar treytir skulu vera galdandi fyri, at dagrøkt og dagstovnar kunnu hava felags leiðslu, og skal støðið í hesum reglum takast í pedagogiskum atlitum.

Ein samanlegging av leiðsluni millum eina dagrøkt og ein dagstovn kann merkja eina evarska lítla sparing í útreiðslum hjá kommununum, tí ein partur av teimum umsitingarligu uppgávunum hjá dagrøktini og dagstovninum kunnu gerast bíligari. Men eingin sparing kann gerast í samband við týdningarmiklu uppgávuna, sum dagrøktarleiðarar hava við vegleiðing og eftirlit av dagrøktarum, sum er grundarlag undir trygdini og námsfrøðiligu dygdini, og neyðugt er, at námsfrøðingar røkja hesar uppgávur. Munurin á endalønini hjá dagrøktarleiðara við námsfrøðiligari útbúgving og námsfrøðingi á dagstovni er 19,01 kr. um tíman, meðan tað er øvugt við lønini hjá dagrøktarleiðara uttan útbúgving og námsfrøðingi á dagstovni, tá er lønin hjá námsfrøðinginum á dagstovninum 7,93 kr hægri um tíman enn lønin hjá dagrøktarleiðara uttan útbúgving. Leiðaralønin kann hækka eitt lønarstig, orsakað av hækkaðum barnatalið og hækkaðum starvsfólkatímum, svarandi til 11.190,40 kr. árliga. Av lønarmuninum skal kommunan gjalda í minsta lagi 70 % og foreldrini í mesta lagi 30%.

Ein samanlegging av leiðslunum fyri dagrøkt og dagstovn kemur at ávirka útrokningina av foreldragjaldinum.

| | Fyri landið/landsmynduleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar bólkar | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | |

**Hoyring**

Uppskotið skal til hoyringar hjá:

1. Kommunusamskipan Føroya
2. Føroya kommunufelag
3. Kommunala arbeiðsgevarafelagnum
4. Almannaráðnum
5. Føroya pedagogfelag
6. Føroya arbeiðarafelag
7. Starvsmannafelagnum

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1.**

Skotið verður upp at nágreina ásetingina í § 8, stk. 1, soleiðis, at tað greitt gongur fram, at talan er um tvær skipanir í leiðsluhøpi, samstundis sum uppskotið ger tað møguligt hjá kommununum at seta felags leiðslu fyri dagstovn og dagrøkt. Sambært galdandi skipan ber neyvan til at seta felags leiðslu fyri dagstovn og dagrøkt.

**Til § 1, nr. 2**

Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin við kunngerð skal áseta nærri reglur um undir hvørjum treytum kommunur kunnu hava felags leiðslu á dagrøkt og dagstovni.

**Til § 2**

Skotið verður upp, at løgtingslógin kemur í gildið dagin eftir at hon er kunngjørd.

**Fylgiskjøl**

Skjal 1: Hoyringssvar frá xxxxxxxxxx

Skjal 2. Hoyringssvar frá xxxxxxxxxx

Mentamálaráðið, tann xx.xxxx. 2011

Helena Dam á Neystabø

landsstýriskvinna

/Leivur Harrysson